## Fyrireika bátahyl

Leirvíkar kommuna er í ferð við at fyrireika arbeiðið at gera ein nýggjan bátahyl á Toftanesi. Arkitektavirkið Sp/f Selmar Nielsen og P/f LBF hava gjørt nøkur uppskot um, hvussu hylurin kann gerast, og kommunan hevur gjørt av at arbeiða víðari við einum av uppskotunum. Á fíggjarætlanini í ár eru seks mió. krónur settar av til bátahyl, og ætlanin er at fara undir sjálvt arbeiðið sum skjótast, skrivar heimasíðan hjá Leirvíkar kommunu.

## Nýggjan stjóra

Í gjár varð boðað frá, at størsta fyritøkan í Grønlandi, Royal Greenland, skal hava nýggja leiðslu. Paviaraq Heilmann, sum hevur verið stjóri, verður nú varastjóri, og nýggjur stjóri er Flemming Knudsen, sum higartil hevur verið stjóri í flogfelagnum Air Greenland. Tað merkir, at flogfelagið hevur mist báðar leiðararnar, tí formaðurin, Peter Grønvold Samuelsen, er eisini farin í starv hjá Royal Greenland. Stjórin og varastjórin eru settir fyri fýra ár.

# Ógreitt um eldurin var ásettur

**Húsini í Havn, sum brendu í gjár, hava staðið tóm í longri tíð. Tí undrast bæði løgregla og brandmenn á, at eldur kom í og breiddi seg so skjótt**



*Tá brandmennirnir komu á staðið, var ikki hugsningur um at fara inn í húsið at sløkkja. Myndin talar fyri seg*

BRANDUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Um 4-tíðina seinnapartin í gjár fekk fekk Brandstøðin á Oyggjarvegnum boð um, at eldur var í einum húsum á Egholmstrøð í Havn omanfyri SMS. Eldurin var helst kyknaður í kjallaranum og breiddi seg tí sera skjótt um alt húsið. Tað var tí onki annað at gera hjá brandmonnunum enn at royna at fyribyrgja, at eldurin ikki breiddi seg til grannahúsini, sum tíbetur standa nakað niðanfrá.

– Veggirnir vóru í bleytum plátum, ið eru sera eldfimar, og tí bar slettis ikki til at fara inn í húsini, men at royna at sløkkja útifrá, sum ikki er tann besti mátin at sløkkja eld, sigur Anfinn Reinert frá Brandstøðini, sum var leiðari fyri eldsløkkingini í gjár.

Rættiliga skjótt stóð eldurin út úr øllum húsinum, og tað gekk umleið ein hálvur tími, áðrenn so mikið tamarhald var á støðuni, áðrenn ráðiligt var at senda roykkavarar inn í húsið.

– Fyri okkum ráddi tað um at avmarka eldin í byrjanini, og tað eydnaðist so mikið væl, at tað var ongantíð vandi á ferð fyri grannahúsini, sjálvt um stráluhitin var øgiligur. Tíbetur var lítil vindur, og tað var eisini við til at forða fyri, at vandi uppstóð, sigur Anfinn Reinert.

Hann vil ikki geva nakað boð uppá, hvussu eldurin er kyknaður, men eins og á politistøðini undrast hann á, at eldur er komin í eini hús, sum hava staðið leingi køld og tóm.

– Sjálvt um mann hevur sínar tankar, so vildi tað verið skeivt av mær at sagt nakað um, hvørt eldurin er ásettur ella ikki. Sjálvandi kann tað hugsast at fuktur í húsinum kann hava gjørt eitthvørt við elinstallatiónirnar, men tað havi eg als ikki nakað boð uppá. Hetta er nakað, sum løgreglan tekur sær av at kanna, sigur Anfinn Reinert.

Brandfólkini fingu skjótt ábendingar á, at ongin var inni í húsinum, men kortini verður ein bygningur altíð kannaður úr enda í annan fyri at staðfesta, um so er. Hetta varð eisini gjørt í gjár, og tíbetur vísti tað seg at vera rætt, vísir Anfinn Reinert á.

### Løgreglan kannar orsøkina

Heldur ikki av Politistøðini í Havn fæst nakað at vita um orsøkina til eldin.

– Enn er onki ítøkiligt at halda seg til. Vit kunnu bara staðfesta, at eldurin kyknaði skjótt, og tí kann einhvør gera sær sínar tankar, men enn vit onki at hava ein illgruna um eldáseting í. Fyrst mugu vit gera eina roynd at finna arnastaðið, har eldurin er kyknaður og síðani kanna, hvussu hann er uppstaðin, sigur Oluf Mortensen, vakthavandi á Politistøðini.

Hann vísir á, at tað í flestu førum er lutfalsliga lætt at staðfesta, hvar eldurin er kyknaður, tí har er altíð eitt sindur svartari enn í restini av bygninginum.

Oluf Mortensen sigur, at teir hava tosað við fólk í grannalagnum og tey sum vóru har á leið fyri at finna útav, um tey hava sæð, hoyrt ella vita nakað annars. Ikki minst børnini og tey ungu.

Tað tók tveir tímar at sløkkja eldin, men ikki fyrr enn fýra tímar eftir, at eldurin varð fráboðaður, var alt sløkkiarbeiðið liðugt.

Hetta er fyri at tryggja, at tað ikki liggja ósløktir lummar, har eldurin kann kykna uppaftur.



*Nógvur roykur var í grannalagnum við Egholmstrøð í Havn, tá eldur kom í hesi húsini um fýratíðina seinnapartin týsdagin*



*Fyrstu tveir tímarnar gingu við at sløkkja útifrá, áðrenn roykkavarar sluppu inn í húsið at eftirsløkkja, sum brandfólkini kalla tað*